# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Landssjúkrahúsið – spariætlan ørska

Landssjúkrahúsið hevur brúk fyri 30 milliónum afturat í ár fyri at halda fram við óbroyttum virksemi. Í gjár høvdu vit tíðindini um, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum ætlar at spara út við 15 milliónir krónur. Ítøkiliga merkir hetta, at allar skurðviðgerðir restina av árinum skulu avlýsast uttan tær, sum eru bráðneyðugar. Í øðrum lagi merkir hetta, at sjúklingar ikki fáa allan neyðugan heilivág - í triðja lagi merkir hetta, at bíðilistarnir gerast longri. Fortreyt fyri uppskotinum er, at Løgtingið játtar 15 milliónir eyka. Hetta kann sostatt bert merkja, at fyri at fáa tær fimtan milliónirnar, skal stovnurin skerja virksemið við øðrum fimtan milliónum!

Spariætlanin tykist sum ein fullkomuliga absurd avgerð. Her hava vit fyri nógvan pening bygt eitt ovurnútímans meginsjúkrahús. Fyri fyrstu ferð í ártíggjur eru vit við at fáa eitt fysiskt sjúkrahúsumhvørvi, sum megnar at draga fakfólk við bestu læknaligu, røktarfrøðiligu og tøkniligu førleikum at sær til gagns fyri allar føroyingar – alt sampakkandi við Visjón 2015. Men henda góða og jaliga tilgongd er ikki meira enn byrjað, so verður hon steðgað orsakað av tørvandi játtan, av politiskum trongskygni og illvilja. Alt hetta politiska spælið kring árligu játtanina til Landssjúkrahúsið virkar sum ørska. Tað sær ikki mætari út enn, at samgonguflokkarnir á løgtingi og í landsstýri ikki bara góðtaka hetta, men tað tykist sum teir vilja steðga tí góðu fakligu tilgongd og tí menning, sum hevur verið á Landssjúkrahúsinum, síðan nýggi bygningurin varð tikin í brúk. Hvat liggur aftan fyri henda politiska illvilja móti okkara meginsjúkrahúsi. Er tað veruliga so, at lokalpolitisk áhugamál framvegis forða einum skilagóðum sjúkrahúspolitikki? Ella er hetta beisku fruktirnar av neiligari herferð, sum partur av pressuni nú í tvey ár hevur rikið móti Landssjúkrahúsinum? Er hetta eitt úrslit av trótandi vitan blandað við politiska líkasælu? Ella eru heilsa og vælferð bara ikki á dagskránni hjá hesari landsstýrissamgonguni? Ella er hetta kanska ein blanding av øllum hesum?

Ein undrandi almenningur stendur við mongum ósvaraðum spurningum.Taparin í hesum absurda glantrileiki er ikki bara Landssjúkrahúsið, men føroyski brúkarin, sum bert hevur hetta eina staðið at søkja sær heilsubót á hægsta fakliga støði, um hesin brúkari verður raktur av álvarsamari sjúku. Tað er burturvið at steðga planløgdum viðgerðum, og tað er valla lógligt at sýta sjúklingum neyðugan heilivág. Skulu landsstýrismaður og flokkur hansara koma frá hesum málini við æruni og atkvøðunum innanborðað, eigur hann at leggja einki minni við enn starv og samgongu, fær hann ikki allar tær trýati millionirnar frá samgongumeirlutanum.

**Sosialurin**

## Blind, deyv og menningartarnað skulu eisini á festivalar

Nú hásummar er, eru nógv forvitnislig tiltøk at fara til. Ráðið fyri Brekað vil í hesum sambandi minna á, at tað er sera umráðandi at fyriskiparar hugsa um atkomuviðurskiftini í síni heild.

Øll eiga at fáa høvi at luttaka, og soleiðis kunna verða ein virkin partur av øllum tí, sum verður bjóðað. Jú betri viðurskiftini eru, tess fleiri kunnu luttaka.

Hetta er ikki minst galdandi, nú festivalar og stevnur eru fyri framman, og nógvir gestir vitja land okkara.

Málið er at bróta niður forðingar, soleiðis at eitt nú fólk, ið eru blind, sjónveik, deyv, rørslutarnaði og onnur sleppa at luttaka á jøvn-

## Tøving í Mentanarhúsinum

**Tey, ið kundu hugsa sær at lært gamla hondverkið tøving, og tey sum hava áhuga í máling, fáa nú høvi at royna seg**

HANDVERK
*tíðindaskriv*

Hetta er triðja árið á rað, at Mentanarhúsið í Fuglafirði verður karmur um skapandi skeiðini, sum tær báðar Unn Eldevig Petersen og Randi M. Gunnarsdóttir, skipa fyri. Skeiðini undanfarin ár hava verið so væl umtókt, at fyrireikararnir nú hava valt at hava tað í trimum umførum, soleiðis at pláss verður fyri fleiri luttakarum. Fyrsta skeiði var í mai, og tað næsta verður í døgumum 18. – 20. Juli.

Unn Eldevig Petersen sigur, at luttakararnir koma úr øllum Føroyum, og at hetta gjørdi skeiðsumhvørvið enn meira áhugavert. Stemningurin var merktur av arbeiðshugi og kreativiteti, og fólk tyktust at gloyma tíð og stað: -Summi høvdu langt at koyra til Fuglafjarðar, men tey vóru so upptikin av arbeiðinum, at tey vildu ikki leggja amboðini fyrr enn seint á kvøldi. Men longu tíðliga morgunin eftir vóru tey farin aftur til verka, sigur Unn.

Skeiðið endar við framsýning, har luttakarar kunnu sína fram tað, sum tey hava latið úr hondum hesar dagarnar. Í góðveðrinum í fjør varð framsýningin flutt út á torgið við Mentanarhúsið, og varð hon sera væl vitja.




## Brestur hurð

Brestur hurð
gummistilvar gleiva
á nývaskað gólv
snýsur
snoddar í spískamarinum
Bangin, tiga
spísk eygu
upp eftir trappuni
í trimum fetum
uppi á loft
runt og melur
melur ígjøgnum
út í túnið
snýsur

farin, nú friður
eina løtu
tøma knappeskju
spæla við knappar

spæli við kna....
brestur hurð

**Helga D. Jacobsen**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.